# Go Go Blues í Klaksvíkar Klubba



DANSUR

Seinastu mánaðirnar hevur Klaksvíkar Klubbi verið karmur um eina rúgvu av stórri og smærri tiltøkum. Seinasta stóra tiltakið var ein vísukonsert við Stanley Samuelsen og rimmar dansur við Sillyboy´s aftaná. Tiltakið eydnaðist sera væl, og nógv fólk møttu upp. Hetta tiltakið var serliga ætlað teimum tilkomnu.

Nú komandi leygarkvøld er enn eitt tiltak á skránni. Hesaferð er tiltakið serliga ætlað teimum yngru. Klaksvíkar Klubbi kann bjóða einki minni enn Go Go Blues, vinnaran av stóru Prix Føroyar kappingini. Og hettar orkestrið rokkar. Ella »bluesar« um man kann siga tað so.

Garvaðir tónleikarar s. s. Arnold Ludvig, Røgvi á Rógvu og Uni Debes fara at geva alt tað, teir hava lært. So um tú ert til góðan blues í hugnaligum umhvørvið, er Klubbin staðið, nú leygarkvøldið, sigur Klaksvíkar Klubbi í tíðindaskrivi.

## Niðurteljing til G! á Rás 2

G! Festival og Rás2 fóru í hesi vikuni at samstarva um nýggja sending, sum setur fokus á G! Festivalin. Sendingin hevur viðkomandi tónleikin, samrøður við tónleikarar, fyriskiparar og áhoyrarar, kappingar og praktiskar upplýsingar. Stutt sagt alt tú hevur brúk fyri at vita um festivalin. Niðurteljingin til G! er á skránni hvønn hósdag kl 15 til festivalin.

-nud

## Sýna menn fram á Gøtusandi

**G! vísir lekrasta mann í Danmark fram á Gøtusandi.**

At G! festivalurin hevur nógv og spennandi tónleikanøvn at bjóða í ár, er eingin loyna, men eisini eyguni verða forkelað.

Simon Kvam sangari í bólkinum Nephew er júst valdur til lekrasta mann í Danmark av tíðarritinum Bazar.

-nud


Vit fylla 1 ár við

SUZUKI

Í juli 2005 er eitt ár liðið síðan vit gjørdu sáttmála, at umboða

SUZUKI

Í hesum sambandi hava vit nógv góð tilboð í juli mánaða

Vitja okkum tí í juli mánaða

Tað kann væl loysa seg

BERG MOTORS

STARAVEGUR 1-3 · POSTBOKS 1039 · 110 TÓRSHAVN

TEL 31 35 35 · FAX 31 77 35 · WWW.BERGMOTORS.FO

Sosialurin 311820





KT-fólk til Atlantic Airways

Vit sóknast eftir einum kt-fólki við innliti og yvirliti. Høvuðsuppgávurnar fevna um at menna skipanir, at standa fyri netumsiting og at veita brúkarum hjálp.

Talan er um nógvar ymiskar skipanir við fleiri ymiskum uppgávum, og tí krevst breiður og neyvur kunnleiki til tólbúnað, net og forrit. Talan er um einar 60 brúkarar.

Tú hevur viðkomandi útbúgving ella góðar royndir, ið fevna um forritan, datugrunnar og netumsiting. Harafturat leggja vit dent á, at tú dugir at leggja títt arbeiði skilagott til rættis og hevur góð samstarsevni.

Tú ert røkin, arbeiðir sjálvstøðugt og ert til reiðar at taka eina hond í, tá ið á stendur. Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum. Arbeiðsumhvørvið er sera gott, og møguleikarnir at menna seg bæði fakliga og persónliga eru góðir.

Starvið verður sett skjótast til ber eftir sáttmála við Atlantic Airways. Umsókn merkt »kt-fólk« kann sendast til Atlantic Airways, FO-380 Sørvági, og skal vera okkum í hendi seinast 11. juli kl. 12.00.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com

www.sansir.fo